Løgmálaráðið

Dagfesting: 16.10.2023
Mál nr.: 23/02096-28
Málsviðgjørt: EM

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 87 frá 16. mai 2022 um foreldramyndugleika og samveru (foreldramyndugleikalógin), verða gjørdar hesar broytingar:
§ 20. … *Stk. 2.* … *Stk. 3.* Tað av foreldrunum, sum barnið ikki býr hjá, kann søkja um samveru. *Stk. 4.* Er eingin ella avmarkað samvera, kann tað av foreldrunum, sum barnið býr hjá, biðja Familjufyrisitingina um at áseta samveru. Familjufyrisitingin kann bara áseta samveru um samveruforeldrið vil hava samveru.	**1.** § 20, stk. 3 og 4 verða strikað, og í staðin verður sett: *"Stk. 3.* Familjufyrisitingin kann eftir umbøn taka avgerð um vavið og útinnan av samveru og kann áseta neyðugar treytir í tí sambandi, undir hesum um at varðveita passið hjá barninum og at tryggja, at samveruforeldrið ikki er ávirkað av alkoholi ella øðrum dusandi evnum, meðan samvera er. *Stk. 4.* Bæði samveruforeldrið og bústaðarforeldrið kunnu søkja um at fáa samveru ásetta. Familjufyrisitingin kann tó bara áseta samveru, um samveruforeldrið vil hava samveru.

	Stk. 5. Familjufyrisitingin kann nokta at áseta samveru ella seta eina avtalu ella avgerð um samveru úr gildi.”
§ 21. Familjufyrisitingin kann eftir umbøn taka avgerð um vavið og útinnan av samveru og kann áseta neyðugar treytir í tí sambandi. *Stk. 2.* Familjufyrisitingin kann nokta at áseta samveru ella seta eina avtalu ella avgerð um samveru úr gildi.	**2.** § 21 verður orðað soleiðis: “**§ 21.** Ásett ella avtalað samvera dettur bara burtur, tá ið foreldrini hava avtalað tað, ella tá ið Familjufyrisitingin hevur tikið avgerð um tað sbrt. §§ 20 og 22 ella tá ið rætturin hevur tikið avgerð um tað sbrt. § 593 í Retsplejelov for Færøerne.”
§ 23. Er barnið ættleitt, kann Familjufyrisitingin eftir umbøn áseta samveru ella annað samband við uppruna skyldfólk.	**3.** § 23 verður orðað soleiðis: “**§ 23.** Er barnið ættleitt, kann Familjufyrisitingin eftir umbøn áseta samveru ella annað samband við uppruna skyldfólk, serliga um barnið undan ættleiðingini hevði samveru ella annað samband við viðkomandi, ið søkir um at fáa samveru ásetta.”
	4. Yvirskriftin yvir § 29 verður orðað soleiðis: “*Ferðing í sambandi við samveru”*
§ 29. Ferðing og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru innanlands og uttanlands skulu sum meginregla býtast millum foreldrini. *Stk. 2.* Eru foreldur ósamd um ferðing og ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru uttanlands, kann Familjufyrisitingin í heilt serligum føri taka avgerð um býtið av ferðaútreiðslunum, sbr. § 43. *Stk. 3.* Verður samvera ásett við onnur enn foreldur, ber viðkomandi ferðaútreiðslurnar í hesum sambandi.	**5.** § 29 verður orðað soleiðis: “**§ 29.** Foreldrini hava felags ábyrgd av at leggja ferðing í sambandi við samveru til rættis. *Stk. 2.* Familjufyrisitingin kann í heilt serligum førum og eftir umbøn taka avgerð um, hvussu ábyrgdin av ferðingini í sambandi við samveru skal býtast millum foreldrini. *Stk. 3.* Verður samvera ásett við onnur enn foreldur, hevur viðkomandi ábyrgd av ferðingini í hesum sambandi.”
§ 32. Í einum máli um foreldramyndugleika kann rætturin eftir umbøn taka avgerð um, hvør av foreldrunum fyribils skal hava foreldramyndugleikan. Er málið lagt fyri rættin, kann rætturin eisini taka avgerð um, hjá hvørjum av foreldrunum barnið fyribils skal búgva. *Stk. 2-4.* ...	**6.** § 32, stk. 1, 2. pkt. verður orðað soleiðis: “Hava foreldrini felags foreldramyndugleika, og mál um foreldramyndugleika er lagt fyri rættin, kann Familjufyrisitingin taka avgerð um, hjá hvørjum av foreldrunum barnið fyribils skal búgva.”

	7. Sum yvirskrift yvir § 39 verður sett: "*Sjónarmiðini hjá barninum"*
	8. Sum yvirskrift yvir § 42 verður sett: "*Váttan"*.
	9. Sum yvirskrift yvir § 43 verður sett: "*Fíggjarligar upplýsingar"*
	10. Sum yvirskrift yvir § 44 verður sett: "*Broyting og avvísan av umbøn um broyting"*
§ 45. Foreldur, ið eru partar í málinum um bústaðin hjá barninum sbrt. § 18 og um samveru sbrt. §§ 20 og 21, hava rætt til ókeypis umboðan í málum til viðgerðar í Familjufyrisitingini. Hava hesi foreldur ikki fingið umboðan, kann ein advokatur verða tilnevndur til at taka sær av málinum. *Stk. 2-3….*	**11.** § 45, stk. 1 verður orðað soleiðis: "*Stk. 1.* Foreldur, ið eru partur í einum máli um bústaðin hjá barninum sbrt. § 18 hava rætt til ókeypis advokatumboðan."
§ 45. … *Stk. 2.* Advokaturin skal beinanvegin kunnast um skjøl frá Familjufyrisitingini, og fáa eina freist fyri skrivligari framløgu, umframt framløgu av skjølum. *Stk. 3.* Viðvíkjandi samsýning og endurgjaldi fyri útreiðslur til advokat, er sama markið í inntøku grundarlagnum galdandi sum í førum, har frí rættarførsla er játtað, sbr. kapittul 41 í retsplejelov for Færøerne. Útreiðslurnar sbrt. hesi grein verða hildnar av landskassanum.	**12.** Í § 45 verður aftaná stk. 1 sum nýtt stk. sett: *"Stk. 2.* Rætturin til ókeypis umboðan er eisini galdandi í samverumálum, um samverumálið verður viðgjørt saman við málinum um bústaðin hjá barninum, sbr. § 38, stk. 2." Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 3 og 4.
§ 47. ... 1)-4) ... 5) viðgerð av málum um ferðaútreiðslur í sambandi við samveru, 6)-7) ...	**13.** Í § 47, nr. 5 verður "ferðaútreiðslur" broytt til "ferðing".
	§ 2

	Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. *Stk. 2.* Er samverumál byrjað, áðrenn hendan løgtingslóg kemur í gildi, varðveita partarnir rættin til ókeypis advokatumboðan sambært higartil galdandi reglum.